## Olja lekur upp av botni



Fyri góðum tveimum mánaðum síðani staðfestu íslendsku myndugleikarnir, at olja fleyt í sjónum í Faxaflógvanum, og seinni avdúkaðu kanningar hjá vaktartænastuni, at oljan lak úr einum skipsvraki, og at talan var um vrakið av amerikanska sjóverjuskipinum Alexander Hamilton. Hetta skipið fylgdi við handilsskipum um Atlantshavið, til ein týskur kavbátur søkti tað í Faxaflógvanum í 1942. Tað er ikki greitt, hvussu nógv olja var í tangunum, tá skipið bleiv søkt, men metingar siga, at helst hevði skipið millum 100.000 og 600.000 litrar av olju í tangunum, tá tað fór til botns.

## 1.076 fingið svínakrím

Frá 29. juni til tann 6. september skrásett heilsumyndugleikarnir í Íslandi 1.078 tilburðir, har fólk høvdu fingið svínakrím ella høvdu sjúkueyðkenni av krími. Talan var um 586 kvinnur og 492 menn, og tey flestu vóru millum 15 og 34 ára gomul. Haraldur Briem, sóttverjulækni, sigur við Morgunblaðið, at tað er eingin ivi um, at munandi fleiri íslendingar hava fingið svínakrím, enn skrásetingin hjá myndugleikunum sigur. Tølini hjá myndugleikunum vísa, at flestu tilburðirnir av svínakrími eru í Reykjavík og har á leiðini, meðan munandi færri eru smittað á bygd.

# ni sethús



*Hetta sær eitt sindur ógvusligt út – eini heil sethús á trailara í Saltnesi*



*So standa húsini í Lamba, har tey skulu brúkast til skrivstovur*

Joensen, hvat hann heldur, at slíkur flutningur kostar, um fólk, sum keypa hús, ið kommunur vilja hava burtur, mugu gjalda fyri slíkt arbeiði.

- Eg havi til stuttleikar gjørt mær mínar metingar av hesum og eri komin til, at flytingin, sum vit syrgdu fyri seinasta hósdag, helst hevði kostað einar 50.000 krónur.

Hann sigur, at ein slíkur krani, sum brúktur varð til at lyfta húsi á vognin og av aftur vogninum, kostar einar 2000 krónur um tíman – og síðan kostar trailarin einar 550 krónur um tíman.

- Aftrat hesum kemur so tað arbeiði, sum skal gerast, áðrenn flutningurin kann byrja. Nøkur fólk mugu so eisini vera til hjálpar undir arbeiðnum.

Magnus D. Joensen heldur tó, at fólk, sum hugsa um slíka flyting, mugu rokna við, at flutningurin kostar einar 50.000 krónur – alt eftir, hvussu stórar fyrireikingarnar mugu verða, hvussu koyrivegurin er, og hvussu langur teinurin er.

- Men hetta er avgjørt ikki ein ómøgulig uppgáva, um umstøðurnar eru tær røttu, leggur hann aftrat.



*Hann er sera vakur á at líta, nýbygningurin sum nú kemur í flotan fyri gomlu Katrina*

# Nýbygningur sjósettur í Søldarfirði

**Tað var ein stórur dagur hjá Jóan Jakku Johannesen og familju hansara í Søldarfirði, tá nýggi AWI-báturin hjá teimum varð sjósettur**

NÝBYGNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*myndir: Vilmund Jacobsen*



*Ein errin familja, Jóan Jakku saman við konu og dóttir, sum báturin er uppkallaður eftir*

Tað er ikki á hvørjum degi, at nýbygningur verður sjósettur í Søldarfirði, men seinnapartin leygardagin upplivdu fólk eina slíka løtu.

Jóan Jakku Johannesen og synir hansara, sum í nógv ár hava roynt eftir brislingi og sild á Skálafjørðinum við Nordafarbátinum Katrini, hava nú latið nýggjan bát byggja.

Nýggja Katrin, sum eri ein AWI-bátur, er slakar 42 føtur langur, og hann er væl beiðari enn ein vanligur AWI 33, sum er grundarlagið undir nýggja fiskifarinum.

Tað gekk væl at flyta bátin, sum er riggaður til í túninum hjá Jóan Jakku, oman á bryggjuna.

Ein stórur krani hjá Mekanik lyfti bátin á ein vogn, og síðan syrgdi ein lastbilur hjá Vónini fyri, at báturin kom trygt oman á bryggjuna í Søldarfirði, har hann aftur varð lyftur upp av vogninum og settur á sjógv.

Ein minni lastbilur koyrdi aftaná báti og lastbili og skuldi vera til reiðar at halda eftir, um báturin, sum vigar eini 15 tons, fekk ov nógva ferð omaneftir vegnum.

Væl av fólki fylgdi sjósetingini, og stórur áhugi var fyri hesum nýggja og sera snotuliga fiskifari hjá Jóan Jakku og børnum hansara.

Nýggi báturin ber gamla navnið Katrin, sum er eftir einastu dóttrini, ið hjúnini í Søldarfirði eiga.

Í fleiri ár hevur familjan verið savnað um virksemið at veiða brisling, sild og hummara.

Við nýggja farinum skuldu umstøðurnar nú verið uppaftur betri enn áður.

Vit ynskja Jóan Jakku og familju hansara tillukku við nýbygninginum.